

## FIFA vil kanna vanlukku

Altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, krevur nú eina kanning av vanlukkuni sunnudagin, tá Fílabeinsstrondin og Malawi spældu dyst í HM-undankappingini. Ein veggur datt niður 40 minuttir fyri dystin, og fjáltur kom á fólk, so 19 lótu lív og 132 fólk fingu skaða. Sagt verður, at í minsta lagi 36.000 fólk – og í øllum førum fleiri, enn pláss var fyri – vóru møtt upp til dystin, har tey millum annað ætlaðu at síggja Chelsea-framherjan, Didier Drogba, aftur spæla á landsliðnum hjá Fílabeinsstrondini.

## MB kom eisini víðari

MB vann í gjárkvøldið steypadystin ímóti Skála, sum upprunaliga skuldi verða spældur leygardagin, men var útsettur orsakað av kava. MB vann 4-1, eftir at støðan í hálvleikinum var 1-1. Fyri MB skoraði John Johansen tvey mál og Poul Poulsen og Esmar Fagraberg skutu hvør sítt. Málið hjá Skála, sum forrestin kom á odda 1-0, skjeyt Jákup Berthelsen. Miðvingar skulu skírisdag spæla næsta dyst sín í kappingini um Løgmanssteypið, sum verður á útivølli ímóti Víkingi.

# Pál Joensen missir øll síni donsku met




*Danska svimjisambandið, sum í eina tíð hevur kannað sær Pál Joensen, hevur nú gjørt av at strika øll hansara »donsku« met í juniorsvimjing, samstundis sum føroyingar og grønlendingar hereftir bert fáa »donsk« met viðurkend, um teir bara svimja fyri Danmark og ikki Føroyar ella Grønland*

*Mynd: Alexander Djorovic*

**Danska svimjisambandið hevur skert møguleikarnar hjá føroyskum og grønlendskum svimjarum at seta donsk met. Hetta er við afturvirkandi kraft, so tí missir Pál Joensen síni fyrra »donsku« met hjá juniorum, sum føroyingar tó ongantíð hava biðið um at fáa skrásett hjá danska svimjisambandinum**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá Pál Joensen í desember í fjør kappaðist í EM-kappingini í 25 metra hyli í Rijeka í Kroatia, setti hann fýra juniormet, sum blivu skrásett sum donsk met. Metini setti hann á 200, 400, 800 og 1.500 metra teinunum í frísvimjing.

Men eftir einari nýggjari samtykt í nevndini fyri danska svimjisambandið, verða hesi met hansara nú strikað sum donsk juniormet. Orsøkin er, at viðtøkurnar um møguleikarnar hjá føroyskum og grønlendskum svimjarum at seta donsk met, eru broyttar.

Á nevndarfundi tann 11. mars samtykti danska svimjisambandið, at í framtíðini skulu føroyskir ella grønlendskir svimjarar bert hava møguleika at seta donsk met, um teir bert umboða danska svimjisambandið og ikki svimjisambandið í sínum heimlandi.

Samstundis var samtykt, at henda broyting skuldi fremjast við afturvirkandi kraft, so tey fýra metini, sum Pál Joensen longu frammanundan eigur í Danmark, skulu takast frá honum. Hetta verður enntá nevnt í serstøkum tíðindaskrivi, danska svimjisambandið hevur standandi á heimasíðu síni.

### Eigur nógv fleiri met

Spurningurin er so, um onnur donsk met eisini verða strikað, tí Pál eigur tríggjar tær bestu »donsku« juniortíðirnar í 200 metra frísvimjing, harav hann svam ta næst- og triðbestu í Kolding í oktober í fjør, tá hann svam fyri Aalborg Svømmeklub. Á 400 metra teininum eigur hann eisini næstbestu tíðina, sum er frá somu kapping í Kolding.

Á yndisteininum hjá Páli, sum er 1.500 metra frísvimjing, eigur hann somuleiðis tríggjar tær bestu »donsku« tíðirnar. Næstbestu tíðina hevði hann í World Cup-kappingini í Stockholm í november í fjør, tá hann umboðaði Føroyar, og ta triðbestu tíðina hevði hann sum umboð fyri Aalborg Svømmeklub í kappingini í Kolding í oktober.

Bara tey fýra nevndu metini á 200, 400, 800 og 1.500 metra teinunum í frísvimjing eru skrásett sum donsk met, hóast Pál eigur nógv fleiri »donsk« met aftrat, sum tó bara ikki eru skrásett á metlistanum hjá danska svimjisambandinum, ið fyri ein part tykist vera komið í rasshaft av, at fleiri donsk feløg hava kært sína neyð um, at Pál Joensen »oyðileggur« teirra bestu svimjarar, tí hann tekur øll metini.

### Fríggja til Pál

Hinvegin er í ongum føri talan um, at føroyingar hava biðið danskarar tikið metini til sín, tí hesi »donsku« metini eru skrásetingar, danska svimjisambandið hevur gjørt av sínum eintingum – helst fyri onkursvegna at kunna kanna sær Pál, tí hann sum føroyingur hevur danskan ríkisborgarrætt. Í øllum førum stendur Pál í metyvirlitinum á heimasíðuni skrásettur sum heimahoyrandi í »Færøerne, DEN«.

Men nú er liðugt við tí, uttan so at Pál gevst at svimja fyri Føroyar og fer at svimja fyri Danmark í staðin. Sum skilst, røkist lítið fyri tí, og haraftrat kann so staðfestast, at nú danska svimjisambandið tekur stigið og strikar juniormetini hjá Páli Joensen sum donsk met, verður ein tjúkk strika sett undir, at føroysku metini í 200, 400, 800 og 1.500 metra frísvimjing eru nógv betri enn tey donsku.

Í øllum førum 18 ferðir hevur hann svomið skjótari enn donsku juniormetini í bæði 25 og 50 metra hyljum.

# Nummar eitt – men kortini ikki meistari

**Um smáar tvær vikur fer Pál Joensen at kappast beinleiðis við danska svimjaran, Mads Glæsner, hvørs donsku juniormet Pál hevur tikið – øll somul**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fríggjadagin fer 18 ára gamli svimjarin, Pál Joensen, til Danmarkar at fyrireika seg til stóru svimjikappingina, Danish Open, sum verður í Esbjerg frá týsdegnum til sunnudagin í næstu viku. Svomið verður í 50 metra hyli, so tí skal Pál helst hava nakrar venjingar í røttu hyljarlongdini, áðrenn sjálv kappingin byrjar.

Hóast heitið á kappingini er Danish Open, so hevur hon fyri danskar svimjarar tað at siga, at tann teirra, ið endar fremstur í hvørjari av kappingunum, somuleiðis er danskur meistari. Eisini, um onkur fremmandur svimjari endar frammanfyri, tí – sum skilst – kunnu bert svimjarar undir danska svimjisambandinum vinna meistaraheiti.

Tað vil siga, at um Pál Joensen skuldi vunnið onkra av kappingunum, hóast hann í Danish Open fer at umboða Aalborg Svømmeklub, so kann hann helst ikki gerast danskur meistari í nakrari av teimum, tí hann ikki annars svimur sum danskari, men sum føroyingur, ið er partur av einum donskum liði.

### Kappast við Glæsner

Vikuskiftið eftir, leygardagin 18. og sunnudagin 19. apríl, verður Pál aftur við í einari kapping í Danmark, og tá er talan um danska meistaraheitið fyri lið á teimum ymsu teinunum. Aftur her fer hann at umboða Aalborg Svømmeklub, sum júst nú hevur brúk fyri einari hjálpandi hond, fyri at sleppa undan niðurflyting.

Pál Joensen og venjari hansara, Jón Bjarnason, hava havt gott samstarv við svimjifelagið í Aalborg, so tí stóð sjálvandi ikki á, tá danska felagið spurdi, um Pál kundi umboða tað í kappingunum um donsku meistaraheitini fyri lið.

Fyri at kunna gera tað, skal Pál hava svomið eina kapping áðrenn sum umboð fyri felagið, og tað ger hann so í Danish Open-kappingini í Esbjerg. Sostatt eru tey viðurskiftini í lagi, og einki forðar Páli í at vera partur av liðkappingini.

Tað, sum hinvegin kann gerast nokk so stuttligt, er at Pál Joensen allarhelst kemur at svimja í beinleiðis kapping við sterkasta danska svimjaran á longru teinunum í frísvimjing, Mads Glæsner, sum longu frammanundan hevur mist øll síni donsku juniormet til júst Pál.

Hendir tað seg, at Pál er tann fremri av teimum báðum og Glæsner kemur inn sum nummar tvey, verður tað tó hansara tíð, sum verður skrásett sum danskt met og ikki – sum sæst á hinari greinini á hesi síðu – tíðin hjá Páli.